# Rok um fiskiloyvi

**Línumenn eru í øðini um, at gamla Ågot kemur aftur í flotan. Tá skipið fer til fiskiskap, fer tað at økja veiðitrýstið við 40 prosentum og fer eisini at taka fiskidagar frá øðrum línuskipum, siga teir**



*Gamla Ågot kemur nú aftur í flotan undir navninum Jógvan S. Skipið fer at økja veiðitrýstið við umleið 40%*
*Mynd: Solby Eliasen*

FISKIDAGAR
*Edvard Joensen*

Fiskivinnuumsitingin tekur støðið undan fiskidagaskipanini við at ganga beint í móti ætlanini við fiskidagaskipanini.

So avgjørdir eru bæði formaðurin í felagnum Línuskip og formaðurin í vinnunevndini hjá Løgtinginum. Beinleiðis orsøkin til úttalilsini er tann, at línuskipið Ågot er komið aftur í flotan, eftir at tað varð strikað úr skipaskrásetingini í november 2001.

Línuskipið Ågot úr Klaksvík varð í november 2001 strikað úr skipaskrásetingini og selt norskum felag, sum aftur seldi eigarunum av Ågot annað skip í staðin.

Nú hevur felagið Nakkur í Klaksvík keypt Ågot aftur frá norska felagnum og ger tað út til fiskiskap undir Føroyum. Fiskiloyvið er fingið við at leggja loyvini hjá linuskipinum Skørini og útróðrarbátinum Barinum saman. Talan er um eina øking á veiðitrýsið við umleið 40 prosentum.

Fiskiloyvi hjá Barinum er beinleiðis úr útróðrarflotanum, meðan Skørin, tá hon kom til Klaksvíkar av Toftum, eisini fekk eitt útróðrarloyvi. Skørin varð nevniliga keypt uttan fiskiloyvi.

Rólant Poulsen, formaður í felagnum Línuskip, sigur, at talan er beinleiðis um undirgraving av fiskidagaskipanini. Og hann fær viðhald frá formanninum í vinnunevnd Løgtingsins, Henriki Old.

– Beinleiðsi fylgjan av hesum verður, at tá fiskidagar skulu býtast av nýggjum á ólavsøku, fer at mangla í hjá línubátunum, og allir fara at merkja ein niðurskurð, sigur Henrik Old.

Eisini Meginfelag Útróðrarmanna mælir í móti hesum ávísa málinum. Meginfelag Útróðrarmanna og Felagið Línuskip fara sum ein maður at berjast í móti hesi gongdini, siga báðir formenninir.

Ført hevur verið fram í hesum málinum, at Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum umsat fiskivinnumál eitt skifti í vetur, hevur staðið aftan fyri hetta ávísa skipamálið. Men Anfinn Kallsberg sigur í stuttari viðmerking, at hann hevur als ikki verið uppi í hesum málinum yirhøvur. Talan er um eina tilsøgn, sum givin er fyri umleið einum ári síðan, sigur hann.

Meira verður at frætta frá málinum í komandi blaði

# Barnarok í SMS

BARNAROK
*Argja Skúli*

Fríggjadagin 7. og leygardagin 8. mars verður barnarok á Torginum í SMS. 9.a úr Agja Skúla skipar fyri.

Her verður bóltakast, bommtombola, loppumarknaður, andlitsmáling og nógv annað á skránni.

Sera forvitnislig verður hundakappingin fríggjadagin, sum Bibi Haraldsen skipar fyri. Her verður kappast um størsta, minsta og best røktaða hund. 3 steyp verða at vinna. Luttøkan er ókeypis. Neyðugt er at melda til áðrenn fríggjadagin kl. 12 á telefon 511150.

Eisini er barna-sumo kapping leygardagin har børn verða ílatin sumodraktir. Tað kostar 10 kr. í part at taka lut. Tað er ikki neyðugt at melda til framman undan

**Skrá:**
**Fríggjadagin 7. mars**
kl. 10 byrjar tiltakið
kl. 11 andlitsmáling
kl. 14 tak eina mynd av barni tínum og Angelu
kl. 16 Líggjas og Flóvin úr Deja Vu upptraðkar
kl. 17 hundakapping

**Leygardagin 8. mars**
kl. 10 byrjar tiltakið
kl. 11-13.30 barna-sumo kapping
kl. 13 Líggjas og Flóvin úr Deja Vu upptraðkar

# Dagstovnaleiðari settur í Sandavági

*Nýggi dagstovnurin í Sandavági, sum fer at hýsa bæði barnagarði og vøggusovu, verður liðugur at taka í nýslu einaferð seinni í vár*
*mynd: Edvard Joensen*



**Sandavág Kommuna hevur sett leiðari til nýggja dagstovnin, sum letur upp í vár**

DAGRØKT
*Edvard Joensen*

**Sandavági:** Sandavágs Kommuna hevur sett Hervør Olsen sum leiðara á nýggja dagstovninum í Sandavági.

Hervør Olsen er útbúgvin pedagogur og hevur eisini leiðsluroyndir sum slík. Hon er ættað úr Sandavági, men býr í løtuni í Nykøbing á Sjællandi. Familjan flytir til Føroya, nú Hervør skal taka við nýggja starvinum í Sandavági.

Tað vóru fýra umsóknir til starvið sum leiðari fyri nýggja dagstovninum hjá Sandavágs Kommunu. Leiðarin fyri verandi dagrøktini, sum nú verður niðurløgd, var ikki millum umsøkjaranar, sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági.

Nú nýggi dagstovnurin verður tikin í brúk og verandi dagrøktarskipan verður niðurløgd, eru allar dagrøktarmammurnar uppsagdar. Men í næstum verður søkt efir fólki til nýggja stovnin, og so stendur teimum sjálvandi frítt at søkja á jøvnum føti við øll onnur.





*Tunnusláingin við Bursatanga er eitt afturvendandi tiltak hjá Tórshavnar Froskmannafelag.*
*Mynd: Finnur Justinussen*

# Tunnan hjá froskmonnunum alt ov sterk

**- Tunnan, sum verður sligin á sjónum, skal ikki styrkjast, men av misgávum varð hon styrkt í ár, sigur formaðurin í Tórshavnar Froskmannafelag, Heri Andreassen**

FØSTULÁVINTSTILTAK
*Vilmund Jacobsen*

Leygardagurin fyri føstulávint er ein stórur dagur hjá Tórshavnar Froskmannafelag. Í fleiri ár undan føstulávint hava limir í felagnum og onnur, sum hava átt ein froskmannabúna, sligið tunnu við Bursatanga.

Soleiðis var aftur í ár. Eini 25 menn og kvinnur hugnaðu sær soleiðis seinasta leygardag við tunnusláing.

Heri Andreassen, formaður í Tórshavnar Froskmannafelag, sigur, at tað er fastur táttur, at Brandstøðin kemur oman á bryggjuna við bili og syrgir fyri, at tunnan hongur, har hon skal, tá ið tunnusáingin byrjar.

- Væl av fólki plagar at hyggja at, og soleiðis var eisini í ár. Men áskoðaratalið avhongur av veðrinum. Fyrrapartin leygardagin var meira illfýsið, men sum leið um middag, gjørdist veðrið betur og fólk, ið vóru komin oman at hyggja at, hugnaðu sær saman við froskmonnunum.

### Tunnan ov sterk

Heri sigur, at tað tók langa tíð at bróta tunnuna.

- Tunnan, sum verður sligin á sjónum, skal ikki styrkjast, men tað høvdu teir gjørt, ið høvdu riggað hana til. Vit plaga eisini at sláa tunnu eftir nátturða hendan sama dagin, men tá er tað uppi á turrum. Hetta tiltak fer fram í garaguni, sum vit hava. Av misgávum vórðu báðar tunnurnar styrktar.

Heri sigur, at tað eydnaðist froskmonnunum umsíðir at fáa tunnuna niður, men tað tók langa tíð. Kattakongur gjørdist Símun Klein, og hann fekk eitt sonevnt barnasett við fitjum, masku og snorkli.

- Tað er ikki av tilvild, at vinningurin er eitt barnasett. Vit plaga at vera í svimjihøllini mikukvøld, og tá hava við eisini børnini við, sigur hann.



*Tað er óføra stuttligt at hyggja at, meðan froskmennnir hugna sær.*
*Mynd: Finnur Justinussen*

### Hevur 150 limir

Tórshavnar Froskmannafelag hevur umleið 150 limir. Flestu eru úr høvuðsstaðarøkinum, men felagið hevur eisini limir úr øllum landinum.

- Vit húsast á loftinum á gamla Reinsarínum yvir av Sjómansheiminum í Havn. Ein garaga er íbygd gamla handilin hjá Waldemari Lützen, og her hava vit nýggja bátin, vit eiga, sigur Heri Andreasen, formaður í Tórshavnar Froskmannafelag.

Tað var eisini í garaguni hjá felagnum, at tunnusláingin fór fram eftir, at froskmenninir vóru lidnir á Bursatanga.

# Væleydnað barnatiltak í Mentanarhúsinum

**Tríggjar tær vakrastu grýlurnar fingu ein sodavatnskassa í part**

FØSTULÁVINT
*Vilmund Jacobsen*

Barnatiltakið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði seinasta leygardag eydnaðist sera væl og tey umleið 300 børn og vaksin, sum komin vóru saman at hyggja at Angelu og klovninum, Hannibal, hugnaðu sær ófført.

Flestu børnini komu í grýluklæðum, og tað var ikki sørt, at onkur vaksin eisini hevði pyntað seg eitt sindur.

### Tey eru ófør

Tiltakið byrjaði við, at Angela og Hannibal høvdu sína framførslu, sum vardi ein tíma ella so.

Samson Nesá, sum starvast í Mentanarhúsinum, sigur, at børnini vóru ógvuliga hugtikin av teimum báðum.

- Tey høvdu eina góða og undirhaldandi framførslu, og tað er áhugavert at síggja, at Angela og Hannibal ikki standa í stað, men broyta seg alla tíðina, sigur hann.

Barnatiltakið í Mentanarhúsinum vardi einar tveir tímar tilsamans.

Børnini fingu føstulávintsbollar og sodavatn, og tey vaksnu fingu kaffi.

Børnini hugnaðu sær ófført...

Tríggjar tær vakrastu grýlurnar fingu ein kassa av sodavatni í part frá Faxe, sum Poul Michelsen umboðar.

Atgongumerkini til barnatiltakið kostaðu 50 kr.

### Onnur tiltøk

Men Mentanarhúsið hevði eisini nógv onnur tiltøk á skránni í vikuskiftinum.

Stórt, kalt borð var leygarkvøldið, og seinni var 60-ára dansur við Silly Boys og Thunderbirds.

Sunnudagin var vísukonsert við Stanley Samuelsen og Hanusi G. Johansen.





